# ítróttur

Nr. 116 • týsdagur • 22. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo



# Runavíkingar komu væl frá tí

**Matematisku møguleikarnir fyri úrslitinum í Esbjerg leygardagin rukku líka frá 6-0 til 3-3. Jens Martin Knudsen tók broddin av vertunum ta fyrstu hektisku løtuna, og so við og við kom NSÍ til heilt stórar kjansir móti bronsuvinnarunum úr donsku superliguni**

INTERTOTO CUP
*Hilmar Jan Hansen*

(Esbjerg) Tá NSÍ í fjør spældi sín útidyst í UEFA Cup-kappingini í Norra móti Lyn, endaði tað við sorli. Heili 6-0 taptu runavíkinga tann dystin, eftir at teir á heimavølli høvdu tapt 3-1 í fyrra dystinum.

Leygardagin var tó líkt til, at NSÍ hevur lært nakað av hesum, tí burtur sæð frá fyrstu løtuni móti bronsuvinnarunum í donsku superliguni, Esbjerg fB, var ongantíð nakar veruligur vandi fyri endurtøku av sorlinum í fjør.

Fyrst og fremst var Jens Martin Knudsen maðurin, ið helt lív í gulu-svørtu vónunum í ítróttarleikvøllinum í Esbjerg, sum var karmur um dystin. Við fleiri framúrskarandi bjargingum syrgdi hann fyri, at Esbjerg fB ongantíð kom í holt við nakra málveitslu.

NSÍ hevði eitt sindur ilt við at fóta sær fyrstu 15-20 minuttirnar, men fekk síðani spælt seg upp og fekk eisini í løtum givið Esbjerg líka fræga mótstøðu, sum liðið farna kappingarárið mundi fáa frá fleiri øðrum superliguliðum.

Víst fekk Esbjerg fB hol á longu í fjórða minutti, tá Jerry Lucena smekkaði til eftir jørð frá brotsteigarmarkinum, uttan at Jens Martin hevði ein livandi kjans. Men annars var topphúgvumaðurin kongur í feltinum og tók alt, sum kom ímóti.

– Fyrstu løtuna vóru vit undir sera hørðum trýsti, har teir at kalla skræddu okkum sundur. Men eg fekk gjørt nakrar bjargingar har, so eg má bara siga, at eg eri sera væl nøgdur, sigur Jens Martin.

– Hinvegin haldi eg, at vit fótaðu okkum øgiliga væl í dystinum. At vit fóru at fáa onkrar kjansir, høvdu vit í grundini roknað við, tí teir hava so álopshugaðar bakkar, at fyrr ella seinni fór at verða pláss fyri onkrum í okkara part. Og so var eisini.

### Fatur á rætta endanum

Tá hálvur tími var farin av fyrra hálvleiki, fekk NSÍ javnað til 1-1. Málið kom eftir eina løtu, har NSÍ hevði víst gott spæl, so tí var kanska væntandi, at onkur beinleiðis roynd móti málinum fór at spyrjast burturúr.

Málgevandi álopið varð eisini sera gott. Bólturin kom heilt afturi frá vinstru verjusíðu umvegis Brynjolv Nielsen á høgra bakki fram til Helga L. Petersen, sum slapp fram við tveimum verjuspælarum hjá Esbjerg fB, áðrenn hann úr høgru fekk sent væl innfyri.

Gert Langgaard var á rætta staðnum og skuldi skjóta, men onkursvegna fekk hann ongantíð skot á. Í staðin fór bólturin aftur um hann, men har fylgdi Ian Højgaard upp og fekk smekkað bóltin í mótsatta málkrók, uttan at Lars Winde í málinum hjá Esbjerg fB hevði ein livandi kjans at bjarga.

– Tað var ótrúliga deiligt at síggja handan bóltin í málinum. At eg fekk bóltin, var kanska eitt sindur tilvildarligt, men hann kom at liggja øgiliga væl fyri hjá mær, og so var bara at vera avgjørdur og smekka til, segði Ian Højgaard, sum yvirhøvur var væl nøgdur eftir dystin.

– Jú, eg eri nøgdur. Men kortini hevði eg vónað, at bara eitt mál var á muni til síðst. Vit kundu jú komið á odda 2-1, líka so væl sum vit kundu havt minkað til 2-3. At vit so fingu tikið ferðina úr dystinum og forðað teimum í at skapa nakað allan seinna hálvlveik, eri eg framúr væl nøgdur við. Eg haldi, at vit hava lært okkurt frá dystinum móti Lyn í fjør, tá alt skrædnaði hjá okkum.

Tveir minuttir fyri hálvleik var Ian miðdepil í einari hending, ið átti at havt kostað svenska framherjanum, Fredrik Berglund, reyða kortið. Hann sparkaði Ian niður beint undir liðini á maltesiska dómaranum, ið kortini ikki latst um vón, eins og linjudómarin heldur ikki læt við seg koma.

– Tað var heilt ótrúligt, at hetta ikki skuldi kosta honum nakað, tí øll mundu hoyra brestin, tá hann sparkaði meg niður, sigur Ian, ið helt hetta vera orsøkina til, at Fredrik Berglund bleiv skiftur út í hálvleikinum.



*Jústinus R. Hansen dystast við Jakob Poulsen, meðan Ian Højgaard og Aleksandar Jovevic fylgja við*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

### Fleiri kjansir

Eftir at runavíkingar høvdu javnað, fingu teir fleiri møguleikar at leggja seg á odda. Fyrst Gert Langgaard við einum frálíkum skallara frá fimmmetrinum, sum Lars Winde meistarliga fekk refleksbjargað, eins og hann var skjótur út, tá Jónstein Petersen rann alla verjuna hjá Esbjerg fB av, men tamdi ov harðliga við bringuni, so bólturin fór ov langt frá honum.

Eisini eftir at vertirnir høvdu lagt seg framum 3-1, hevði NSÍ møguleikar at svara aftur. Tann størsta átti Helgi L. Petersen fýra minuttir fyri hálvleik, tá hann í høgru síðu fekk skrædd seg leysan av bakkinum og sent móti málinum. Hesa ferð lá Lars Winde flatur uppi undir yvirliggjaranum og fekk júst bóltin á samankomingina og út.

Í seinna hálvleiki var Helgi eisini arkitekturin aftan fyri kanska størsta møguleikan at fáa minkað um munin, tá hann mestsum í yvirtíðini fekk sent innfyri úr høgru síðu. NSÍ-ararnir framman fyri málinum vóru í yvirtali og stóðu rættiliga væl fyri, men eingin teirra fekk fatur á bóltinum, ið mestsum bara skuldi sópast inn.

– Eg eri ikki ordiliga nøgdur við úrslitið, men allíkavæl nøgdur. Teir eru eina deild betri enn vit, men eina ella aðrastaðni hevði eg vónað, at vit kundu fingið ein javnleik, hóast tað er nokk so nógv at vænta sær, segði Helgi L. Petersen.

Hann var leygardagin ein av fleiri NSÍ-arum, ið førdu seg fram á høgum stigi í dystinum móti donsku bronsuvinnarunum. Aðrir vóru eitt nú Jónstein Petersen, Ian Højgaard, Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen og sjálvandi Jens Martin Knudsen.

Spurningurin er so, hvat NSÍ kann gera við Esbjerg fB seinnapartin leygardagin, tá liðini møtast á Svangaskarði í seinna dystinum. Tað velst um, um tann dysturin fer at líkjast fyrstu løtuni við stórum trýsti á sær ella síðsta korterinum av fyrra hálvleiki við góðum NSÍ-spæli í longum løtum.

Um vit venda aftur til matematikkina, so kemur NSÍ víðari við einum 2-0 sigri. Tað er nokk meira, enn krevjast kann av føroyskum amatørum móti donskum yrkisspælarum, men hinvegin er bólturin framvegis rundur…

## InterToto Cup

**Leygardagin 19. juni 2004 í Esbjerg**

**Esbjerg fB-NSÍ 3-1 (3-1)**

1-0: Jerry Lucena, 4. min.
1-1: Ian Højgaard, 30. min.
2-1: Søren Barslund, 36. min.
3-1: Jess Thorup, 38. min.

**NSÍ:**
Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Dánial Hansen, Óli Hansen, Sjúrður Jacobsen (Andy Olsen, 63.) – Aleksandar Jovevic (Kári Hansen, 46.), Ian Højgaard, Jústinus R. Hansen – Helgi L. Petersen, Gert Langgaard (Eddie Mikkelsen, 81.), Jónstein Petersen

**Esbjerg:**
Lars Winde – Martin Jensen, Nikolai Høgh, Kjetil Pedersen – Frank Hansen, Jan Kristiansen (Tommy Løvenkrands, 46.), Jakob Poulsen, Jerry Lucena – Søren Barslund (Henrik Hansen, 78.), Fredrik Berglund (Morten Friis, 46.), Jess Thorup

**Gul kort:** Aleksandar Jovevic 17, Helgi L. Petersen 50, Ian Højgaard 64

**Áskoðarar:** 925 (harav minst 100-150 føroyingar).

# Báðir venjararnir nøgdir

**Bæði Ove Pedersen og Jógvan Martin Olsen vóru nøgdir við dystin leygardagin – kanska serliga venjarin hjá Esbjerg fB, ið segði seg frammanundan hava væntað at fingið harða føroyska mótstøðu**

INTERTOTO CUP
*Hilmar Jan Hansen*

**Esbjerg:** Undan dystinum millum Esbjerg fB og NSÍ hevði eitt av jútsku bløðunum róð framundir, at nú skuldi NSÍ »få en på tophuen«, men tað hendi nú ikki. Hinvegin var venjarin hjá Esbjerg fB nøgdur við tað, hansara menn høvdu avrikað teir gott og væl 90 minuttirnar á vøllinum móti NSÍ.

– Havandi í huga, at vit nú eru í ferð við at byggja okkum upp til komandi kappingarár í superliguni, helt eg okkara spæl vera á eini leið. Kanska vit skuldu havt fingið nøkur fleiri mál at byrja við í dystinum, men annars eru eg stak væl nøgdur, segði Ove Pedersen eftir dystin.

– Eg hevði roknað við, at vit fóru at fáa rímiliga harða mótstøðu frá NSÍ, tí føroyingar roynast ofta nokk so drúgvir á vøllinum. Tað vísti seg eisini, at liðið dugdi væl at verja og útnytta teir møguleikar, ið komu. Vit kanska lótu teir fáa í so gott pláss viðhvørt, tí teir dugdu væl at brúka tað ímóti okkum.

Eisini Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ, var nøgdur eftir dystin, ið hann frammanundan hevði ynskt skuldi geva gott útgangsstøði til heimadystin. Tað helt hann eisini, at dysturin hevði givið – hóast tað kundi verið enn betri.

– Burtur sæð frá fyrstu løtuni við persónligum mistøkum og kanska nervum, haldi eg avrikið vera gott hjá okkum. Eftir tað komu vit øgiliga væl við og brendu enntá fleiri kjansir, ið annars plaga at fara í málið, sigur hann.

– Eg iðri meg eitt sindur um, at vit ikki fingu lagt okkum á odda beint eftir útjavningina, umframt at vit eisini kundu fingið minkað um munin við einum máli móti endanum.

Serliga er Jógvan Martin fegin um, at tað eydnaðist NSÍ at halda Esbjerg fB frá at koma til størri kjansir allan seinna hálvleik. Hann hevði tó ynskt sær ein fyrimun aftrat:

– Mest harmiligt haldi eg tó vera, at dómarin ikki tveitti Fredrik Berglund út, tá hann opinlýst og uttan bólt í nánd hevndi seg inn á Ian, tí við einum manni í meiriluta kundu vit kanska havt gjørt uppaftur meira um okkum.

B36-ÍF 4-1 (2-0):

# Vandaleysir fuglfirðingar

**Hóast fólkið tykist vera gott, so vil einki ganga hjá ÍF, sum framvegis er næstniðast á stigatalvuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist B36 at lyfta seg úr aldudalinum, tá teir sunnudagin vunnu tryggan 4-1 sigur á ÍF.

Undan dystinum hevði B36 annars ikki vunnið síðani fjórða leikumfar, og á stigatalvuni hevur hetta borið við sær, at teir bara hava hugt at, meðan Skála og HB hava togað seg avstað í einum stríði, har B36 sjálvt fegin vildi ein partur.

Hjá ÍF hevur støðan ikki verið stórt betri. Síðani teir í øðrum umfari vunnu heimadystin móti NSÍ, er bert ein javnleikur fingin til høldar, og tá er ilt at koma upp um strikuna, sum í løtuni hóttir fuglfirðingar.

### Uttan sjálvsálit

Og tað var eisini sjónligt, at tað vóru tvey lið í kreppu, sum hittust í Gundadali. Spælið var als ikki nakað at rópa hurra fyri, og hóast báðir partar góvu gott pláss a miðvøllinum, so bleiv talan í nógvum førum um sparkarí í vónini um, at álopsmenninir kundu skapa okkurt.

Her tóktist tað liggja betri fyri hja´ÍF fyrstu løtuna. Í varnu útgangsstøðuni, har Bartal var fluttur aftur í miðverjuna, var Magni á Lakjuni einsamallur á toppinum, men ætlanin var so heilt greitt, at fremstu miðvallararnir í besta Drillo-stíli skuldu koma rullandi fram, tá Magni hevði fingið tamarhald á bóltinum. Nakrar opnar møguleikar gjørdist talan ikki um, men fleiri ferðir stóð nógv á B36-verjuni.

Í hinum endanum var sera fátæksligt við vandastøðum fyrstu longu løtuna. Sparkaríið niðan móti álopsmonnunum endaði at kalla hvørja ferð við, at Bartal Eliasen stútaði burtur, og tó at ein væl upplagdur Allan Mørkøre ferð eftir ferð kom niðan við í høgra borði, so var tað rár hending, at bólturin varð lagdur út til hansara.

### Tilvildin ráddi

Tað bendi alt á, at eitt tilvildarligt mál til annan partin, kundi punktera mótstøðuna, og tað sum so eisini tað, sum hendi, tá B36 skoraði.

Alex dos Santos sendi langt innfyri úr høgru, og tá Bárður Mortansson skallaði útfrá, lameteraði Allan bóltin í ÍF meskarnar.

Og so fall alt meira ella minni saman hjá ÍF. Varna útgangsstøðið var at kalla nyttuleyst, nú teir vóru aftanfyri, og at John Petersen at kalla ótarnaður kundi stúta horna í netið til 2-0, mundi ikki bøta um støðuna.

Seinni hálvleikurin gjørdist tó eitt sindur meira spennandi, enn fyrstu trý korterini høvdu bent á. B36 tók seg nú væl longur aftur á vøllin, og tað gav ÍF góðar umstøður at skapa eitt skipað trýst. At teir samtundis fluttu Bartal niðan í álopið, hevði við sær, at teir gjørdist munandi meira vandamiklir í loftspælinum, tó at talan heldur ikki her gjørdist um opnar møguleikar.

Fuglfirðingarnir spentu bogan høgt í royndunum at skora, og brádliga hendi so tað, sum so ofta hendir í slíkum førum. John Petersen varð spældur púra leysur, og einsamallur við málverjanum sveik hann ikki.

### Eitt lið í kreppu

Og so var seinasta luftin farin úr ÍF. Klæmint Matras økti til 4-0, og talan kundi so væl og virðiliga verið um fleiri mál til vertirnar, áðrenn ÍF í yvirtíðini pyntaði um munin eftir horna.

Tað fekk tó ikki fjalt ta sannroynd, at ÍF mest sum líktist einum liði í upployson. Og spurningurin er helst, um verandi aldudalurin hevur rakt somikið meint, at liðið ikki fær reist seg aftur. Enn hava teir luft niður til toftamenn, men avrikini hjá hesum hava bent rætta vegin seinastu tíðina. Komandi vikuskifti fær ÍF vitjan av KÍ, sum ikki hevur vunnið í sjey umfør, og tann dystin hava fuglfirðingarnir neyvan ráð at tapa.

Hjá B36 mundi sigurin hinvegin vera eitt kærkomið lyft, men hann fekk tó ikki fjalt, at liðið framvegis hevur stórar trupulleikar at arbeiða við. Á pappírinum hava teir góðan møguleika at ogna sær trý stig afturat, áðrenn farið verður í summarfrí, tá teir vitja á Toftum. Verður tað so, so hevur liðið um ikki annað konsoliderað seg í ovaru hálvu av stigatalvuni, men teir skulu framvegis hava góða hjálp frá øðrum, um teir skulu ota seg longur uppeftir.



*Niels Joensen og B36 vóru omaná í dystinum ímóti ÍF í Gundadali sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fakta um dystin

**B36-ÍF 4-1 (2-0)**

1-0 Allan Mørkøre, 30
35.: 2-0 John Petersen, 35
70.: 3-0 John Petersen, 70
74.: 4-0 Klæmint Matras, 74
89.: 4-1 Hanus Eliasen, 90

B36:
Tróndur Vatnhamar – Allan Mørkøre, Jóhannis Joensen, Egil á Bø, Arnbjørn Danielsen – Bárður Mortansson (Jens Erik Rasmussen, 72.), Kenneth Jacobsen (Ronnie Samuelsen, 77.), Niels Joensen, Alex Dos Santos – John Petersen, Áki Mørk (Klæmint Matras, 62).

**ÍF:**
Karstin Joensen – Áki Petersen (Torstein Joensen, 77.), Viggo Johannesen, Bartal Eliasen, Rúni Elttør – Fritleif í Lambanum, Eyðolvur Petersen, Høgni Zachariasen – Árni Petersen, Atli Petersen (Høgni á Lakjuni, 60.), Magni á Lakjuni (Hanus Eliasen, 60.).

**Gult kort:** Høgni á Lakjuni.

**Dómari:** Jens Petur Brattalíð. Hevði ikki nevniverdar trupulleikar av tomu uppgerðini.